LM-055/2023

Fylgiskjal 7

Bára Michelsen

Fra: Bára Michelsen på vegne af Fíggjarmálaráðið
Sendt: 23. november 2023 10:32
Til: Jákup Eyðfinn Kjærbo
Emne: VS: Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Grønar hitaloysnir, talgilir fjølmiðlar og talgild avgjaldsuppgerð)

Fra: Rani Reginsson Johansen <RaniReginsson.Johansen@taks.fo>
Sendt: 22. november 2023 10:05
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Cc: Birta Biskopstø <Birta.Biskopsto@taks.fo>
Emne: Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Grønar hitaloysnir, talgilir fjølmiðlar og talgild avgjaldsuppgerð)

TAKS hevur fylgjandi viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Grønar hitaloysnir, talgilir fjølmiðlar og talgild avgjaldsuppgerð), sum er til ummælis alment:

- Í mun til § 3 d mælir TAKS til at nágreina treytirnar fyri at fáa meirvirðisgjaldið av íløgu í hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn endurgoldið, tá íløgan verður gjørd tvørtur um ár. Arbeiðið kann t.d. byrja eitt ár og verða goldið árið eftir og vice versa, ella tað byrjar eitt ár, og nakað verður goldið tá, og rest árið eftir o.s.fr. TAKS mælir til at siga ítøkiliga, hvørt arbeiðið skal vera liðugt og fullgoldið, áðrenn søkjast kann.
- Í mun til § 12, stk. 1, litra h, mælir TAKS til at siga ítøkiliga, at tíðindabløð, har meira enn 50% av innihaldinum eru reklamur, eru ikki mvg-frítikin. Fyri talgildar miðlar kann dentur leggjast á reklamu inntøkurnar.

Vinarliga

Rani R. Johansen
fulltrúi

Lógardeildin
Tel. 352741

TAKS

Postrúm 2151, FO-110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel 35 26 00

Fyrivarni

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og strika brævið.